# Heimastýri er avoldað

**Skipanin við heimastýri er avoldað og eigur at verða avloyst av nýggjum skipanum, har Grønland og Føroyar fáa økt sjálvstýri ella loysing. Tað var greiði boðskapurin hjá Norðuratlantsbólkinum í Fólkatinginum.**

MAGNUS DAM
*Keypmannahavn*

### Setanarorðaskiftið

Teir tríggir limirnir í Norðuratlantsbólkinum vístu frá fyrsta degi, hvørja dagsskrá teir hava í Fólkatinginum. Endamálið er at broyta viðurskiftini í ríkisfelagsskapinum, sum teir halda vera eina avoldaða skipan.

Hetta kom púra greitt fram, tá Kuupik Kleist síðani Lars Emil Johansen og at enda Høgni Hoydal vóru á røðarapallinum í Fólkatinginum hóskvøldið og søgdu sína hjartans meining um ríkisfelagsskapin og skipanina við heimastýri í Grønlandi og Føroyum.

Høgni Hoydal duldi ikki fyri, at hann sum tjóðveldismaður arbeiðir fyri at avtaka føroysku umboðanina í Fólkatinginum, at Føroyar fáa sína egnu grundlóg og taka á seg alla politiska og búskaparliga ábyrgd av Føroyum.

Hann vísti á fleiri brot í setanarrøðuni hjá Anders Fogh Rasmussen, har forsætisráðharrin í breiðum týdningi tosar um frælsi, demokrati, ábyrgd og samhaldsfesti.

- Tað er júst hetta, sum føroyska stjálvstýrisstríðið byggir á. Og við at lurta og samstarva kann Danmark gerast eitt undangonguland á hesum økinum. Við at stuðla sjálvstýrisrørslunum í Norðuratlantshavi kann Danmark vísa í verki, at landið arbeiðir fyri einum meira demokratiskum og rættvísum heimi, segði Høgni Hoydal.

### Einastandandi møguleiki

Smáar tjóðir hava ein einastandandi møguleika í dag. Einum landi nýtist ikki at vera risastórt, hava egnan stóran her og hava fyri neyðini at útbúgva allar íbúgvar heima hjá sær sjálvum. Einki land klárar seg uttan tætt samstarv við onnur lond og altjóða stovnar, sum fáa størri og størri týdning, vísti hann á.

- Hetta gevur smáum tjóðum møguleika at taka fullu politisku og búskaparligu ábyrgdina av egnum landi. Og sjálvstýri ella fullveldi er framvegis fortreytin fyri, at eitt land kann taka á seg ábyrgd í heiminum og samstarva í altjóða felagsskapum.

Høgni Hoydal vísti síðani á, at fortreytin fyri sjálvstýri ella fullveldi er, at Føroyar verða virdar í fólkarættarligum høpi og við tí sjálvsavgerðarrætti, sum hetta gevur. Og hann segði seg vóna, at tá ið forsætisráðharrin tosaði um trý fólk á jøvnum føti, Danmark, Grønland og Føroyar, so kundi hann eisini vátta, at hetta inniber eina viðurkenning av sjálvsavgerðarrættinum hjá føroyingum og grønlendarum í fólkarættarligum týdningi.

### Eingi lyftir

Men nakra váttan frá forsætisráðharranum fyri hesum fekk hann ikki. Ikki aðra enn tað vanligu vissuna fyri, at føroyingar sjálvir avgera sína lagnu.

Sama hvørja kós, fólkið velur, so er hann sinnaður at tosa um tingini. Í fyrsta umfari ætlar forsætisráðharrin sum skjótast til Føroyar at viðgera støðuna og lurta eftir ynskjunum, sum eru har.

Viðvíkjandi ætlaðu yvirtøkunum hjá landsstýrinum, roknar Anders Fogh Rasmussen við, at stjórnin og landsstýrið heilt skjótt fara at gera avtalu um skúlamálini og almennu forsorgina. Viðvíkjandi flogvøllinum í Vágum og fólkakirkjuni hevur fólkatingsvalið seinkað arbeiðinum nakað, men stjórnin er nú sinnað at fara til samráðingarborðið um hesi málini.

### Grønland eisini á skránni

Anders Fogh Rasmussen ætlar eisini at vitja í Grønlandi at røða um sjálvstýrisynskini har. Tað málið var ovast á breddanum í valstríðnum har, og hóskvøldið tosaðu báðir fólkatingslimirnir sum í ein munn um eina nýggja sjálvstýrisskipan í staðin fyri heimastýrisskipanina.

- Seinast, eg sat í Fólkatinginum, var tað við einum ynski um at fáa heimastýri í Grønlandi. Hetta eydnaðist, og eftir seks ár í Fólkatinginum kundi eg fara avstað við einari heimastýrisskipan í viðførinum. Nú standi eg her við einum ynski um at víðka heimastýrið til eitt veruligt sjálvstýri, og málið er sjálvandi, at eg aftur kann fara úr Fólkatinginum – tá ið tann tíðin kemur – við einari sjálvstýrisskipan í viðførinum, segði Lars Emil Johansen.

Eisini her kundi Anders Fogh Rasmussen vátta, at hann fer at lurta eftir grønlendsku ynskjunum, og hann vísti millum annað á Sjálvstýrisnevndina, sum situr og arbeiðir við framtíðar støðu Grønlands og eftir ætlan verður liðug í juli næsta ár.

### Lisbeth tók fyrivarni

At tríggir av fýra norðuratlantiskum fólkatingslimum tosa um økt sjálvstýri er ongantíð hent áður. Tað var helst eisini hetta, sum fekk Lisbeth L. Petersen til at fara á røðarapallin og vísa á, at hon ikki hevur somu mál sum hinir tríggir. Hjá henni hevur tað týdning bæði at varðveita fólkatingsumboðanina og ríkisfelagsskapin millum tey trý londini, og tað fer hon millum annað at leggja sína orku í í Fólkatinginum.

Og sum mótpolur hjá teimum trimum í norðuratlantiska bólkinum fær hon uttan iva nógv at síggja til, um hennara sjónarmið ikki skulu detta burturímillum.



*Høgni Hoydal duldi ikki fyri, at hann arbeiðir fyri at avtaka føroysku umboðanina í Fólkatinginum*

## UTTAN ÚR HEIMI

# Talibanleiðararnir verða útflýggjaðir

**Nýggi leiðarin í Afghanistan, Hamid Karzai, sigur, at stjórn hansara fer at útflýggja leiðararnar í Taliban.**

ÚTLAND
*Fartekst*

Hinvegin hevur Hamid Karzai gjørt av, at teir vanligu hermenninir hjá falna Taliban-stýrinum, sum eru tiknir til fanga, fáa frítt at fara. Nógvir av hesum hermonnunum eru longu farnir heimaftur, meðan aðrir hava stríðst saman við Norðursamgonguni ímóti leivdunum av Talibanherinum.

Hamid Karzai segði í gjár, at teir ovastu hernaðarligu leiðararnir í Taliban verða ikki latnir leysir. Teir nógvu útlendsku hermenninir, sum hava hjálpt Talibanherinum, og sum hava stuðlað Al-Qaeda og Osama bin Laden, verða heldur ikki latnir leysir.

-Vit fara at at hava teir í varðhaldi, og teir verða síðani útflýggjaðir til altjóða rættarsókn, segði Hamid Karzai við bretsku tíðindastovuna Reuter í gjár.

Fleiri keldur í Afghanistan hava sagt, at andaligi leiðarin í Taliban, mullah Mohammad Omar, hevði biðið nýggja afghanska stýrið veita sær grið aftur fyri, at hann og menn hansara góvust við bardaganum um Kandahar. Men amerikanska stjórnin gjørdi alt fyri eitt greitt, at talan verður ikki um at veita Omar grið.

# Bin Laden ikki at finna

**Er kanska rýmdur úr Afghanistan.**

ÚTLAND
*Fartekst*

Tað gongst illa at finna yvirgangsmannin Osama bin Laden.

Amerikanarar, bretar og afghanska Norðursamgongan hava hildið, at hann hevur fjalt seg í holunum við Tora Bora, men hóast dúgliga hevur verið leitað, síðani Norðursamgongan tók holurnar, hevur eingin borið eygað við bin Laden.

Hildið verður kortini, at Tora Bora var tann seinasti skansin hjá bin Laden.

Talsmaðurin hjá Norðursamgonguni, Mohammed Habeel, segði í gjár, at eingin í Tora Bora hevur borið eygað við bin Laden seinastu dagarnar.

– Hevur hann verið har, er hann helst farin um markið til Pakistan, legði talsmaðurin afturat.

# Taliban leggur vápnini

**Taliban-hermenn í Kandahar og Spin Boldak leggja nú vápnini. Samstundis hava hermenn hjá Norðursamgonguni kannað holurnar við Tora Bora, men bin Laden var ikki at finna.**

ÚTLAND
*Fartekst*

Hermenn hjá Norðursamgonguni hava saman við amerikanskum og bretskum hermonnum leitað eftir Osama bin Laden seinastu dagarnar. Hildið varð fyri vist, at yvirgangsleiðarin fjaldi seg í teimum serbygdu holunum við Tora Bora, men tá hermenn hjá Norðursamgonguni tóku holurnar í gjár, var eingin bin Laden at finna.

Talsmenn hjá Norðursamgonguni søgdu, at nakrar kvinnur og nøkur børn vóru ó holunum, men at tað var ógreitt, um tey hava samband við bin Laden.

Samstundis varð fráboðað, at Taliban-hermenninir í Kandahar vóru farnir undir at lata vápnini frá sær, og at Taliban-hermenninir við býin Spin Boldak eisini høvdu lagt vápnini.

Taliban-leiðslan í Kandahar hevði frammanundan játtað at lata einari nevnd vápnini. Á odda fyri nevndini er ein fyrrverandi hernaðarleiðari í Kandahar, sum Taliban góðtók eftir samráðingar við umboð fyri nýtilnevnda stjórnarleiðaranum í Afghanistan, Hamid Karzai.

Kandahar og Spin Boldak hava verið seinastu skansarnir hjá Taliban í Afghanistan, og nú hermenninir har hava valt at leggja vápnini, bendir alt á, at kríggið er um at vera av.

Vikuskifti

Nr. 238 • leygardagur • 8. desember 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

**Eru Fregnir rugbreyðið í føroyska blaðheiminum?**

Henda spurning viðger Kim Simonsen í grein, um kjakmentan, speisemi, men mest um Fregnir

Lesið á síðu 4 & 5





*Í løtuni er tað Emma, sum kann kalla seg poppdrotning í Føroyum. Fløgan hjá henni og hinum í M'as Blues Band er stóra hittið í landinum í løtuni*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Emma bukar Britney

Í Føroyum hava altjóða poppdrotningar og -kongar ongan kjans ímóti M'as Blues Band. Hóast Britney Spears og Michael Jackson brúka óteljandi milliónir av krónum til sínar útgávur, so er alt til fánýtis, tá Emma syngur Babu

M'AS BLUES BAND
*Eyðun Klakstein*

Babu babu babu babu babu babu.

Soleiðis ljóðar niðurlagið í best umtókta sanginum í landinum í løtuni.

Tað er M'as Blues Band, sum spælir, og tey hava tikið øll á bóli.

Síðani fløgan við Emmu og teimum kom á gøtuna fyri 10 døgum síðani, hevur fløgan gingið sum heitt breyð. Sangirnir hava verið at hoyrt hvønn tann einasta dag á útvarpsrásunum. Og eisini á dansistøðum kring landið sigst, at sangurin Babu er tað stóra hittið millum ungfólk.

Nú skal sangurin royna seg á hittlistanum hjá Útvarpinum, 15 teimum bestu, og tað verður neyvan nakar, sum verður bilsin, um sangurin rýkur í topp.

### Ovfarin av móttøku

Tað er óvanligt, at ein føroysk fløga fær slíka móttøku og vinnur so nógv fram eftir so stuttari tíð.

Men fløgan við M'as Blues Band hevur nakað. Tað gerst tú varugur við beinanvegin, tá tú setir hana í fløguspælaran.

Bólkurin er mannaður við fólki, sum hava eitthvørt brek, og hóast tey hava fingið hjálp frá góðum tónleikarum, so er Emma mest sjónligi tónleikarin á fløguni, og hon syngur sangirnar av heilum hjarta – erligt og beint fram.

Jóannes Jakobsen hevur skipað allar partarnar av arbeiðnum við fløguni, og hann er ovfarin av góðu móttøkuni.

– Tá tú nærkast endanum av slíkum arbeiði, fært tú vanliga eina hóming av, hvat tað kann blíva til. Eg hevði væntað, at fólk fóru at taka væl ímóti fløguni, men eg hevði ikki væntað slíka móttøku, sum fløgan hevur fingið, sigur Jóannes Jakobsen.

### Strævið, men stuttligt

M'as Blues Band er einki upplop, tí seinastu trý árini hava tey spælt saman. Og tað hevur eisini tikið drúgva tíð at spæla fløguna inn.

– Tað tók fleiri mánaðir at syngja sangirnar inn, men hóast tað var strævið og kravdi nógv av øllum, so var Emma serstakliga hugalig. Hon hevði ongantíð hug at geva upp, og tað var altíð við einum smíli, at hon kom í studio, sigur Jónnes Jakobsen.

– Hetta er fjórða fløgan, sum eg havi verið við til at geva út, men hetta hevur verið klárt tann stuttligasta fløgan at gera.

Sangirnir á fløguni eru lættir og stuttligir. Onkur meira álvarsamur sangur er eisini við. Tónleikurin er sera væl spældur, og tað er ikki so løgið, tí talan er um nakrar av fremstu føroysku tónleikarunum, sum spæla undir.

– Tá vit seinastu trý árini hava spælt ymsastaðni, hava vit brúkt eitt keyboard til grundina í tónleikinum. Tað kundu vit eisini gjørt á fløguni, men tú fært heitari og meira livandi tónleik við at lata tónleikarar spæla allan tónleikin, og tað valdu vit at gera, sigur Jóannes Jakobsen.

– Útgávan er ikki bara ein spurningur um tónleik, tað er eisini ein viðurkenning av menningartarnaðum fólki. Kanska kann hetta vera við til at geva fólki eina aðra mynd av teimum.